# Maria hjá Mil verður 85



Týsdagin 5. juni, grundlógardagin, fyllir Maria Joensen á Heygum í Vestmanna 85 ár. Hóast henda rímiliga høga aldur er Maria enn eins løtt í sinni og vit altíð hava kent hana. Maria var fødd í Sørvági, men flutti sum pinkubarn oman til Vatnsoyrar, har faðir hennara, Martin Jacobsen, Lítli Martin nevndur, var ein av teimum trimum nýbyggjarunum við nátturuvakra vatnið. Hinir vóru Suðuroyar Dánjal og Stóri Martin.

Maria fór sum ung genta at tæna á posthúsinum í Vestmanna. Í hesi vøkru bygd kom hon eisini at festa búgv. Hon giftist við Emil Joensen, Emil hjá Hanni, og høvdu tey eitt gott hjúnalag saman, til Emil doyði 69 ára gamal í 1990.

Í nógv ár hevði Maria sína dagligu gongd á flakavirkinum, har hon hevði sítt fasta pláss við samlibandið saman við øðrum konubrotum úr Vestmanna og grannabygdum. Emil starvaðist eisini sum arbeiðsformaður á sama staði eftir at hava verið sjómaður meginpartin av vaksna lívi sínum.

Tey eiga 4 børn: Jóhannes (Hanni), Martin, Fíu og Marner.

Hóast nógvar av gomlu og kendu bygdamyndunum á Heygum ikki eru longur, so ganga tær báðar granna- og vinkonurnar, Maria og Olga hjá Samson, framvegis dagliga inn á gólvið hvør hjá aðrari í Heygatúni at práta um farnar dagar – og at hyggja eftir Dynasty.

Hevur onkur hug at hyggja inn á gólvið á Heygum týskvøldið at heilsa uppá føðingardagsbarnið, so hevur Maria ein góðan kaffimunn á kannuni, hava vit frætt.

Hjartaliga tillukku við degnum, fræga kvinna, og Harrans signing framyvir

**M**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ein ella annan hátt sýndu samkenslu, tá elskaði pápi, verpápi og abbi okkara

**Thorvald Thorsteinsson**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til familju og vinir, ið hjálptu til við jarðarferðini. Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og ein serstøk tøkk til starvsfólkini á Suðuroyar Ellisheimið.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur til Suðuroyar Ellisheim. Eisini eina tøkk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Rógvi, Regin og Georg**

## 70 ára føðingardagur

8. juni og 21. juli fylla Eiler og Hergerð Samuelsen Klaksvík 70 ár. Tey halda føðingardagarnar 8. juni heima Við Mylnutún 9 fra kl 18.

**Dagurin**

**5. juni. Grundlógardagur,** hildin til minnis um at fría stýrisskipanarlógin kom í gildi í Danmark henda dag í 1849. Dagurin ber annars navnið Bonifacius. Hann var enskur munkur, sum var tiltikin trúboðari og fekk navnið ápostul Týsklands. 80 ára gamal varð hann saman við 52 øðrum myrdur av heidningum í Frísalandi hvítusunnudag ár 754.

Jákup Dahl varð føddur hendan dagin 1878 og deyður í 1944.

Frank Antoniussen:

# Gevst sum býarverkfrøðingur

## – *eftir 34 ár í starvi*

**Hósdagin 31. mai hevði Vágs Kommuna móttøku í samband við, at Frank Antoniussen gevst sum býarverkfrøðingur**

**STARV**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hósdagin hevði Frank Antoniussen sín síðsta arbeiðsdag sum býarverkfrøðingur hjá Vágs Kommunu.

Frank, ið er ættaður úr Oyndafirði, byrjaði í starvi sum býarverkfrøðingur hjá Vágs Kommunu í 1973 og hevur sostatt verið 34 ár í starvinum.

Nógv fólk nýttu høvið at støkka inn á gólvið og heilsa uppá Frank, nú hann gevst í starvinum. Starvið hevur havt við sær, at hann óivað er komin í samband við flest allar vágbingar hesi 34 árini, hann hevur røkt starvið sum býarverkfrøðingur í Vági.



Rætting:

# Effersøe er grivin í gamla kirkjugarði

Í sambandi við at 150 ár eru liðin síðan Rasmus Christoffer Effersøe varð føddur, komu vit at óskentni at skriva, at hann er grivin í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin í Havn.

Hetta er sjálvandi ikki rætt. Hann doyði í 1916, og kirkjugarðurin við Velbastaðvegin var ikki tikin í brúk fyrr enn í 1935.

Rasmus Effersøe er grivin í gamla kirkjugarði á Svínaryggi, sum er við Dr. Jacobsensgøtu og Dalavegin í Havn. Grøvin er tætt við sunnara portrið, til vinstru - nakrar fáar metrar niðan frá portrinum.

**mg**





MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin